# Pengar mugu fylgja við fríplássum

*Landið kann ikki áleggja kommunum at gjalda fyri fríplássini til barnagarðar, hóast kommunurnar onga ávirkan hava á skipanina, heldur Eyðgunn Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráði*



**Kommunurnar skulu gjalda fyri fríplássini í ansingarstovnum, hóast tað er landið sum letur plássini. Tað skulu kommunurnar ikki góðtaka, heldur Eyðgunn Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráði**

ANSINGARPLÁSS
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Formaðurin í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráði finnist harðliga at skipanini fyri fríplássini til ansingarstovnar.

Kommunurnar hava yvirtikið barnaansingina, og tað heldur Eyðgunn Samuelsen er eitt framstig, men hon heldur, at einki høpi er í at áleggja kommununum at gjalda fyri frípláss í barnagørðum, tá kommunan onga ávirkan hevur á hesa útreiðslu.

– Vit gera ikki av, hvør kann fáa fríplás í barnagørðunum, tí tað er ein landsuppgáva. Hinvegin er tað órímiligt, at vit skulu gjalda fyri hesi pláss. Tað eigur kommunan ikki at góðtaka, og vit eiga at gera vart við hetta, heldur Eyðgunn Samuelsen.

Hetta sjónarmiðið bar hon fram á býráðsfundi í Klaksvík týskvøldið.

**Ein lítil millión**
Fríplássini til barnagarðar í Klaksvík verður mett til 800.000 krónur komandi ár, men verða fleiri ansingarpláss, so fer útreiðslan fyri fríplássini eisini at hækka.

– Landið kann ikki bara áleggja kommununum at yvirtaka slíkt øki, uttan at tað fylgja pengar við, heldur Eyðgunn Samuelsen.

– Eg dugi væl at síggja fyrimunin við at hava eina landsumfatandi skipan sum ger av, hvør kann fáa fríplás. Á tann hátt syrgja vit fyri, at treytirnar eru tær somu kring landið, men kommunurnar eiga ikki at góðtaka, at útreiðslurnar fyri hesa skipan verða lagdar á kommunurnar, uttan av vit fáa nakað endurgjald, sigur hon.

# Fiskimenn meira frítíð

**Jørgen Niclasen, landsstýrismaður, heldur at fæst meira lønsemi í fiskivinnuna, so fer tað eisini at koma fiskimonnum til góðar.**

Á almennum fundi í Klaksvík mánakvøldið greiddi hann frá framtíðar fiskivinnupolitikkinum, sum hevur til endamáls at skapa karmar fyri framgongd í vinnuni.

Hann helt, at færri og størri eindir fara at hava við sær færri arbeiðspláss í fiskivinnuni, men hann heldur eisini, at umstøðurnar hjá arbeiðsfólki og fiskimonnum fara at verða betri.

– Fáa vit meira lønsemi í vinnuna, so fer tað eisini at gagna fiskimonnunum. Teir fara at vinna meira pengar, og harvið verður eisini møguleiki at brúka meira tíð heima saman við familjuni, sigur Jørgen Niclasen.

– Tíðin er farin frá, at ein fiskimaður fer umborð fyrsta dagin í árinum og kemur í land jólaaftan. Í framtíðini skal fiskimaðurin hava meira frítíð, heldur hann.

Landsstýrismaðurin heldur, at ein endurnýggjan av fiskiflotan fer eisini at økja munandi um trivnaðin hjá fiskimonnum umborð.

*ek*

# Nógvur roykur

**Klaksvík:** Sløkkiliðið í Klaksvík varð seinnapartin týsdagin boðsent til bedingina, har illgruni var um, at eldur var í rækjutrolaranum, Sjúrðaberg, sum JFK eigur.

Her var tó talan um nógvan royk, men ongan eld.

Sjúrðaberg er til umvælingar á bedingini í Klaksvík, og nógvi roykurin frá skipinum komst av, at motorurin varð settur í gongd.

Sløkkiliðið í Klaksvík fekk sostatt ein róligan kaitúr burtur úr neyðsendarboðunum.

*ek*

Í Býin

Á matarseðlinum

Suppa og breyð 35,-

Sandwich Baguette
kylling & bacon: karry dressing, salat og tomat 45,-
ost & skinka: miracel whip, tomat og bacon 45,-
ost & kalkun: miracle whip, tomat og bacon 45,-

Lasagna v/oksakjøt 49,-

Pitabreyð v/oksakjøt 49,-
v/tunsalat 49,-

Café Natúr
Tlf. 31 26 25

AUTO
-Dag sum nátt-
-skjótt og gott-
BENZIN
DIESEL
KIOSK
-ALT DØGNIÐ-
Skal tú bil hýra
-so er tað 311234
AUTO
311234

Í Býin



Í Býin

LAMBS BUFFET
fríggjakvøldið 21/9
leygarkvøldið 22/9
sunnukvøldið 23/9
kl. 18.00-21.30
Stór buffet
Leskiligir rættir úr feskum føroyskum lambskjøti
- ostaborð og dessert
kr. 175,-
borð kann bíleggjast
Hotel Hafnia
Áarvegur 4-10 • Postboks 107
110 Tórshavn
Tel. 31 32 33 • Fax 31 52 50
E-mail: hafnia@hafnia.fo
www.hafnia.fo

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spælir
Arne Strøm
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er
livandi tónleikur
Nátaveitslan verður leygarkvøldið kl. 20.00
Nú fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll
Sverrisgøta 22
Tlf. 31 15 65



HESA VIKUNA
Hóskvøldið
DJ Marjon Petersen
Fríggjakvøldið
80'ara kvøld
ladies night
DJ Martin Kjærbo
Leygarkvøldið
DJ Martin Kjærbo
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÍGGJA
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
Írskur búffur
v/chips, salat & whiskeysós
EISINI TANN BESTI Í LANDINUM
69,-
Discoteque
Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo



fríggjakvøldið 21/9 Discoteque
Konufólk ókeypis atgongd áðrenn kl. 01.00
Alt hálvur prísur áðrenn kl. 02.00
leygarkvøldið 22/9 70'ara kvøld
DJ Ottar í Funningsstovu
eisini verða gesta DJ's
20 ára aldursmark
PLATFORM
discoteque
petur & petur • 320870

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681
Fríggjadagin 14. september
• "Fimmari"
• Opið er frá kl. 17.00
UNDIRHALD
Leygardagin 15. september
• Opið frá kl. 22.00
• Dansur frá kl. 24.00 - 04.00
KRISS skipar fyri

fk Matseðilin
Hósdagin 20. sept.:
Hamburgarryggur
Fríggjadagin 21. sept.:
Kotelettir
Leygardagin 22. sept.:
Kálvasteik
Mánadagin 24. sept.:
Kalkunfrikadellur
Týsdagin 25. sept.:
Fiskafrikadellur
Mikudagin 26. sept.:
Rivjasteik
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari *ella*
Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Kaggin
Fríggjakvøldið spæla
Moon-shot
Kaggin
www.kaggin.fo

Í Býin
- hvønn hósdag

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Strendur
Leygarkvøldið:
• Tórsh.-Strend. kl. 21.45
• Strend.-Tórsh. kl. 23.00
• Tórsh.-Strend. kl. 04.30 frá City
(Steðga verður við steðgiplássini hjá bussleiðini og bygdaleiðir á vegnum aftur og fram)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Bussarnir:
Tlf. 287752

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Tlf. 424254
Leið Vestmanna
Leygarkvøldið :
• Vestm.-Tórsh. kl. 20.50
• Vestm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 24.30
• Vestm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30 frá City
(Koyrt verður um Kvívík)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu



Bussarnir:
Tlf. 286254